# ir góðum sjúkrahúsverki



t sjúkrahúsverkið sum heild verður rikið so effektivt og rationelt sum til ber, soleiðis at

Mynd: Álvur Haraldsen



*Hans Pauli Strøm, landsstýrismaður í almanna- og heilsumálum hevur skrivað hesi sjónarmið í sambandið við viðgerðina av løgtingsfíggjarlógini fyri 2008*

Mynd: Jens Kristian Vang

javnvág við tillutaðu játtanina. Her vil eg bert nevna nøkur av týdningarmiklastu tiltøkunum:

**Óheft kanning av rakstrinum:**
Almanna- og heilsumálaráðið er komið ásamt við Fíggjarmálaráðið um beinanvegin at seta eina djúptøkna kanning av rakstrinum av sjúkrahúsunum í verk. Fíggjarmálaráðið skal standa fyri kanningini, sum ein skjóttarbeiðandi bólkur við óheftari útlendskari serfrøði skal gera og koma við síni niðurstøðu longu um einar 3-4 mánaðir. Endamálið við kanningini er:

- at lýsa møguligar skeivleikar og forðingar fyri rationellum rakstri av sjúkrahúsunum,
- vísa á neyðugar broytingar í fyriskipan og rakstri, og
- at leggja grundarlagið fyri eini samanberandi virksemismáting (benchmarking) av føroysku sjúkrahúsunum í mun til onnur líknandi sjúkrahús í útlondum.

Er ein niðurstøða av kanningini, at játtanin til sjúkrahúsini – eisini játtanin sum fíggjarlógaruppskotið fyri 2008 fer at áseta - ikki er í samsvar við ella er ov lítil til tað neyðuga virksemið, ið verður kravt av sjúkrahúsunum, so skal tað verða tikið til eftirtektar, og landsstýrið skal taka stig til at fáa játtanina broytta samsvarandi.

**Alt heilsuverkið skal skipast undir einari leiðslu:**
Føroyska heilsuverkið skal virka og skipast sum ein eind – sjúkrahúsini, serviðgerð uttanlands, kommunulæknaskipanin og barnatænastan skal skipast undir einum stýri. Hetta merkir m.a., at tað verður ein leiðsla omanfyri øll trý sjúkrahúsini, sum skal hava møguleika og heimild til at leggja virksemið til rættis upp á tvørs av øllum trimum sjúkrahúsunum – bæði hvat viðvíkur uppgávum, tey einstøku sjúkrahúsini skulu loysa, og hvussu samlaða tilfeingið, bæði fíggjarliga, starvsfólkaliga, tøkniliga og viðv. bygningum, verður gagnnýtt á besta hátt. Endamálið er at fáa sum mest og best burtur úr hvørjari krónu, ið verður játtað.

Felagsheitið skal stutt og greitt verða Heilsuverkið, stjórnað av einum heilsuverkstjóra. Í fíggjarlógaruppskotinum verður peningur settur av. So skjótt fíggjarliga heimildin er fingin, verður starvið lýst leyst. Fyrsta uppgávan verður sjálvsagt at uppbyggja nýggju fyriskipanina av Heilsuverkinum. Síðan at taka stig til ein meira samskipaðan og harvið meira rationellan rakstur av sjúkrahúsverkinum. Ein onnur av uppgávunum verður at gera eina meting av verandi leiðslubygnaði á teim 3 sjúkrahúsunum, við tí sonevndu 3-streingjaðu leiðsluni, og taka møgulig stig til at endurskoða henda bygnaðarháttin.

**Mál- og avriksstýring:**
Á øllum trimum sjúkrahúsunum skal farast undir mál- og avriksstýring, byrjandi við Landssjúkrahúsinum longu frá komandi ári. Endamálið við hesum er at fáa ein greiðari dialog millum sjúkrahúsleiðslu og politisku skipanina, um tey mál, ið skulu setast fyri sjúkrahúsunum, um ætlaða virksemið og um fíggjarligu fortreytirnar fyri hesum. Hetta skal setast upp í ein mál- og avrikssáttmála sum grundarlag fyri eini virkisætlan um at fremja tey settu málini, í mun til sjúklingin, starvsfólkini og gagnnýtsluna av fíggjarliga tilfeinginum.

**Nýggj fíggjarstýringsskipan fyri sjúkrahúsverkið:**
Sum liður í mál- og avrikstýringini skal farast skal undir at seta nýggjar fíggjarstýringsskipanir í verk, sambært álitinum um framtíðar sjúkrahúsverk. Her er serliga talan um eina virksemistreytaða fígging, sum er væl kend frá okkara grannalondum. Í mun til ta núverandi skipanina, har ein fíggjarkarmur verður ásettur uttan beinleiðis krøv um eitt ávíst virksemi, so vil ein virksemistreytað fígging viðføra, at tað verður ein samanhangur millum virksemið og fíggingina, út frá nøkrum fastløgdum takstum. Hetta tekur drúgva tíð at fyrireika og kann neyvan setast í verk fyrr enn um eini 2-3 ár.

**Talgilda heilsuskipanin skal fullførast:**
Sum neyðugt stýringsamboð má hagtalsgrundarlagið fyri virksemið á sjúkrahúsunum styrkjast munandi. Hetta er ein partur í stóru KT-verkætlanini um sonevndu Talgildu heilsuskipanina, THS. Tí er heilt avgerandi at THS verður framd til fulnar so skjótt sum møguligt. Longu frá komandi ári má tann sjúklingafyrisitingarligi parturin verða fult virkin (hetta snýr seg um sambandið við kommunulæknaskipanina, innskriving, sjúklingagongd, bíðilistar vm.). Tí hava vit eisini ráðfest hetta økið í komandi fíggjarlógaruppskotinum.

**Innanhýsis vikarstovu:**
Finnast skal ein loysn á spurninginum um teir sera dýru útlendsku vikararnar á Landssjúkrahúsinum sum skjótast. Hetta kann t.d. verða við at skipað eina innanhýsis vikarstovu á sjúkrahúsinum.

**Flyting av fakmørkum:**
Bæði fyri at minka um trotið á ávísum starvsfólkum, og fyri at fremja betri gagnnýtslu av starvsfólkatilfeinginum, skulu gerast avtalur um flyting av mørkunum fyri, hvat einstøku fakbólkarnir taka sær av. Her verður serliga hugsað um læknar, sjúkrarøktarfrøðingar og heilsurøktarar. Hetta er átroðkandi, og er eisini blivin ein størri møguleiki, nú fyrsta hold av nýggju heilsurøktarunum varð liðugt av Almanna- og heilsuskúlanum í februar. Endamálið er heilt greitt at optimera gagnnýtsluna av tøkum starvsfólkatilfeingi, og at betra um møguleikarnar fyri at rekruttera røttu starvsfólkini til tær røttu uppgávurnar.

**Strategisk menningarætlan:**
At tað eru nógvar góðar kreftir í sjúkrahúsverkinum, sum gera sítt ýtarsta fyri at sjúkrahúsini skulu kunna veita føroyingum tað best møguligu tænastuna, og eisini fyri at sjúkrahúsini skulu kunna vera góð og vælvirkandi arbeiðspláss, havi eg nógv dømi um á vitjanum á Landssjúkrahúsinum og Klaksvíkar og Suðuroyar sjúkrahúsið. T.d. var eg boðin til eina framløgu í síðstu viku á Landssjúkrahúsinum. Tað var gleðiligt og vónríkt at vera við til framberingina av hesi menningarætlan, sum leiðsla og starvsfólk á Landssjúkrahúsinum hava arbeitt so væl og longi við, og har tey nú stinga út í kortið strategisk mál fram til 2009 á fimm økjum:

Um dygd í sjúklingagongdini, Um starvsfólkamenning og trivnað, Um kunning og samskifti, Um KT-nýtslu sum heilsufakligt og umsitingarligt amboð, og um At alt tilfeingið skal verða gagnnýtt munagott.

Henda menningarætlanin er fult í tráð við uppskotini í álitinum um Framtíðar sjúkrahúsverk, og eg vóni at tað fer at eydnast teimum væl at gera hesa djørvu ætlan ítøkiliga og fara undir at seta hana í verk.

Henda ætlan er eitt gott dømi um positiva viljan og potentialið í sjúkrahúsverkinum, sum føroyska samfelagið, almenningurin og ikki minst politiska skipanin ikki mugu sláa hondina av, men fegnast um og stuðla uppundir.